# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Myndugleikarnir vilha hava námið stongt, og tað geri eg. Eg fari ongantíð aftur higar*

*(Robert Murray)*

# Rhys bleiv 11 ára gamal

**Bretar eru skelkaðir av tilburðinum í Liverpool, har ein ellivu ára gamal drongur bleiv skotin og doyði**




*Rhys Jones bleiv skotin, meðan hann spældi fótbólt saman við vinmonnunum*

Tann 11 ára gamli Rhys Jones og tveir javnaldrar spældu fótbólt á einum parkeringsplássi uttan fyri vertshúsið Fir Tree Pub fyrrakvøldið, tá ein størri drongur kom yvir til teirra og skeyt trý skot. Eitt av skotunum rakti Rhys Jones í nakkan, og hóast hann bleiv fluttur á sjúkrahús beinanvegin, doyði hann lítla løtu seinni í ørmunum á mammu síni.

Drápið hevur skelkað Bretland. Gordon Brown, forsætisráðharri, fordømdi tað.

- Hetta er ræðuligt og hevur skelkað land okkara. Vit mugu finna teir, sum gjørdu hetta, og teir skulu takast og revsast fyri hetta brotsverkið, segði Gordon Brown við Sky News í gjár.

Drongurin, sum skjeyt Rhys, hevði okkurt fyri andlitið, men løgreglan í Liverpool vónar at fáa onkrar upplýsingar frá fólki í umhvørvinum, sum kunnu hava sæð ella hoyrt eitt ella annað. Samstundis hevur løgreglan lovað at verja øll, sum kunnu koma við avgerandi upplýsingum.

Rhys Jones var íðin viðhaldsmaður hjá fótbóltsfelagnum Everton, og Tim Cahill, sum er ein av stjørnuspælarunum hjá felagnum, er sera harmur um tað, sum er hent.

- Eg skilji ikki, at nakar skal fáa seg til at skjóta ein smádrong, sum spælir fótbólt saman við sínum vinmonnum, sigur Tim Cahill við Sky News.

Drápið var í býarpartinum Croxteth, sum hevur verið plágaður av harðskapi, og summi halda, at drápið hevði samband við, at altsamt fleiri ungir dreingir í bretskum býum taka seg saman í bólkar, sum skipa fyri ymsum brotsverkum. Tey, sum kenna til hetta umhvørvið í øðrum býum, siga, at tað kann hugsast, at tann ungi drongurin myrdi Chris, tí hann skuldi vísa, at hann er førur fyri at gera slíkt. Morðið var tí kanska ein upptøkuroynd.

# Gera seinastu roynd í dag



**Kemur einki lívstekin frá teimum innistongdu námsarbeiðsmonnunum í Utah í dag, steðgar leitingin**

- Hetta verður tann seinasta boringin. Hoyra vit einki lívstekin ígjøgnum holið, fáa vit ikki gjørt meiri, sigur Robert Murray, sum eigur vanlukkunámið við Crandall Canuon í amerikanska statinum Utah.

Tann 6. august var ein lítil harðskjálvti í økinum, og seks arbeiðsmenn, sum vóru niðri í kolanáminum, vórðu stongdir inni. Síðani hava bjargingarlið roynt at fáa samband við teir, og royndirnar hava higartil kostað trimum bjargingarmonnum lívið. Royndin, sum byrjaði í morgun, er tann sætta og samstundis eisini tann seinasta.

Teir seks menninir vóru meiri enn 600 metrar undir jørð, tá jarðskjálvtin stongdi teir inni, og serfrøðingar siga, at tað eru at kalla ongar vónir um at finna menninar aftur á lívi. Robert Murray ásannar, at hann hevur heldur onga vón um at finna menninar aftur á lívi, og eina avgerð hevur hann tikið.

- Námið verður stongt, og eg fari ongantíð aftur higar, segði hann, tá tann seinasta bjargingarboringin byrjaði í morgun.

*Avvarðandi hjá teimum seks námsarbeiðsmonnunum fáa eina frágreiðing um bjargingararbeiðið*

## STUTT SAGT

### Háða Ísrael

Fyri einum ári síðani vóru harðir bardagar ímillum ísraelska herin og hermenn hjá rørsluni Hizbollah í Libanon. Bardagarnir vardu 34 samdøgur, og hesar dagarnar sendi Hizbollah 4000 rakettir inn í Ísrael, sum bumbaði Libanon afturfyri. Nú skipar Hizabollah fyri einari framsýning frá bardøgunum. Framsýningin er á einum savni beint sunnan fyri Beirut, og Hizbollah dylur ikki fyri, at eftir hennara tykki vann hon bardagarnar ímóti Ísrael. Tí verða ísraelsku hermenninir háðaðir, og tað ber til at keypa videospøl, har tað ber til at skjóta ísraelskar hermenn og stríðsvognar.

### Eingin stjórn

Fyri hálvum triðja mánað síðani var tjóðartingsval í Belgia, men enn hevur landið ikki fingið nýggja stjórn. Teir kristiligu demokratarnir vunnu valið tann 10. juni, men formaður teirra, Yves Leterme, noyddist í gjár at boða Albert kongi frá, at hann fær ikki meiriluta fyri einari nýggjari stjórn. Ein orsøk er, at teir kristiligu demokratarnir eru úr tí flamska partinum av Belgia. Teir krevja størri sjálvræði, men tað vil tann franski parturin ikki góðtaka. Nú skal kongur so tilnevna ein annan samráðingarleiðara.

### Vorðið sum bót

Finski ríkiskassin gjørdi kvetti, tá ein svenskur miljóningur endaði í einari av teimum sokallaðu ferðfellunum nú um dagarnar. Svenski ríkmaðurin koyrdi 67 kilometrar um tíman á einum vegateini, har hámarksferðin er 30 kilometrar, og fyri tað fekk hann 20.500 evrur ella150.000 krónur í bót. So nógv skal hann tó neyvan gjalda. Í 2001 fekk ein av Nokia-stjórunum 800.000 krónur í bót fyri at koyra ov skjótt, men bótin endaði niðri á 44.000 krónum.